Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Gera sólpanelskipanir og eldrivin prutl mvg-frí

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at broyta lóggávuna, so eldrivin prutl eisini verða fevnd av mvg-frítøku eins og onnur motorakfør?

2. Ætlar landsstýrismaðurin at syrgja fyri, at aðrar grønar orkuskipanir so sum sólorka eisini verða frítiknar fyri mvg?

Viðmerkingar:
Grøna orkuskiftið er heitt kjakevni og verður tað helst eisini frameftir. Øll heimsins lond gera bindandi avtalur um at leggja um til grønari orkuloysnir og steðga CO2-útlátinum á klótuni.

Í dag eru fleiri undantøk í mvg-lógini, sum gera tað lættari at skifta til grønar akfarsloysnir. Tað er greitt, at mvg-frítøkur ikki gagna borgaranum, um søluliðið hækkar prísin samsvarandi mvg-frítøkuna. Tó vísa frítøkurnar og líknandi átøk, at fleiri leggja um til grønari orkuloysnir.

Eldrivin prutl eru ikki undantikin mvg, hóast tey eru motorakfør á sama hátt sum onnur akfør, ið eru undantikin mvg. Mvg-frítøkurnar í meirivirðisgjaldslógini fata einans um akfør, ið eru fevnd av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, men í lógini um avgjøld við skráseting av motorakførum er greitt ásett, at hon ikki fevnir um prutl, og tað hóast tey eisini eru eitt slag motorakfari.

Sólpanel eru ein av grønastu orkuloysnunum. Tekniskt, búskaparliga og sum orkukelda er hetta ein góð loysn fyri húsarhaldið sum hjáorkukelda. Tí kann tað undra, at ymiskar aðrar orkuloysnir sleppa undan mvg, men ikki sólpanelskipanir.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 7. apríl 2022

Jóhannis Joensen